# Aftur av ferð



EDVARD JOENSEN

Meðan vesturskinið kínir skorunum vestantil á Streymoynni, eru bátarnir á veg til hús aftur eftir til fánýtis at hava leitað eftir grindini, sum fráboðað var á Dølunum. Teir funnu hana ikki. Heldur ikki teir, sum syðri leitaðu, funnu nakað.

Sum ein onnur havfrúgv fer báturin strúkandi heim aftur. Hvørvur hálvur viðhvørt. Viðhvørt er bara masturin undan. So aftur allur kroppurin. Kemur líkasum upp at forvitnast eftir, hvussu vorðið man vera. Man nakað vera at síggja? Ella er bara frægast at vera undir?

Grindaboðini komu um telefonina. Soleiðis hevur mangan verið fyrr, men ikki altíð eydnast kortini at finna tað, boðað er frá. Heldur ikki hesaferð.

Boðini komu kortini kki sum hjá Jákupi á Møn, tá nógvur roykur var. Nú verður ikki glaðað meira. Nú koma boðini umvegis fartelefon ella e-mail. Eisini grindin er moderniserað.

Og uppi á landi fylgja tey eisini við. Tað er skjótt, at fólk og bilar eru á ferð. Tað gongur skjótari nú, enn hjá Ketli gamla á sinni. Nú fer eingin til gongu í grind meira. Nu er tað við bili. Og teir flyta seg skjótt. Røðin verður heilt long eftir bara nøkrum fáum minuttum.

Øll vilja vita, hvussu vorðið er. Og ber so til at fáa part, er tað eisini í lagi.

Men viðhvørt sleppur grindin.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagni:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi ella av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, men mánadagin yvirhøvur turt. Hitin millum 11 og 15 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 18 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 26 |
| Róm | -- |
| Malorca | 26 |
| Athen | 29 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 16 |
| New York | 19 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 979 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landsynning og grynnist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer framvegis spakuliga í landsynning. Lágtrýstið yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/07 kl. 06⁰⁰–14/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/07 kl. 06⁰⁰–14/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 19,1 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG




12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli: Mánin næstur jørðini
5. juli: Jørðin longst frá sólini
9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. juli | 06.05 | 18.29 | 05.05 | 17.29 | 05.20 | 17.44 | 08.05 | 20.29 | 09.05 | 21.29 | 04.20 | 16.44 | 03.20 | 15.44 | 06.20 | 18.44 | 07.20 | 19.44 | 05.50 | 18.14 | 07.05 | 19.29 |
| 16. juli | 06.52 | 19.15 | 05.52 | 18.15 | 06.07 | 18.30 | 08.52 | 21.15 | 09.52 | 22.15 | 05.07 | 17.30 | 04.07 | 16.30 | 07.07 | 19.30 | 08.07 | 20.30 | 06.37 | 19.00 | 07.52 | 20.15 |
| 17. juli | 07.37 | 20.00 | 06.37 | 19.00 | 06.52 | 19.15 | 09.37 | 22.00 | 10.37 | 23.00 | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 07.22 | 19.45 | 08.37 | 21.00 |
| 18. juli | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 07.37 | 20.00 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 | 06.37 | 19.00 | 05.37 | 18.00 | 08.37 | 21.00 | 09.37 | 22.00 | 08.07 | 20.30 | 09.22 | 21.45 |
| 19. juli | 09.06 | 21.27 | 08.06 | 20.27 | 08.21 | 20.42 | 11.06 | 23.27 | — | 12.06 | 07.21 | 19.42 | 06.21 | 18.42 | 09.21 | 21.42 | 10.21 | 22.42 | 08.51 | 21.12 | 10.06 | 22.27 |

5 707265 100043 >